# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 24. apríl 2024 |
| Mál nr.: | 22/22624 |
| Viðgjørt: | LV/EC |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Rundskriv um byggiverkætlanir

(Til stjórnarráð og stovnar landsins)

**1. Heimild**
1.1. Við heimild í § 27 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan, sum broytt við løgtingslóg nr. 23 frá 18. mars 2020, og í § 25, stk. 2, nr. 5 í fráboðan nr. 164 frá 22. desember 2022 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýriskvinnurnar og landsstýrismenninar, sum seinast broytt við fráboðan nr. 3 frá 1. februar 2024, eftir at hava fingið samtykki til tess á landsstýrisfundi, verður ásett:

**2. Endamál**
2.1. Rundskrivið ásetir reglur um, hvussu byggiverkætlanir hjá landinum skulu verða stýrdar, og hvønn leiklut viðkomandi partar hava í verkætlanunum, soleiðis at tær verða útintar so skynsamt sum gjørligt við atliti at kostnaði, góðsku og rakstri.

2.2. Rundskrivið er grundað á galdandi reglur um bygging, t.d. bygningskunngerðina og AB-regluverkið, og annars á reglur, sum Landsverk ásetir um bygging. Í tann mun tað – tá ið tað er møguligt – verður vikið frá reglum, vegleiðingum o.ø., skal verða grundgivið fyri tí.

**3. Hvønn er rundskrivið galdandi fyri**
3.1. Rundskrivið er galdandi fyri stjórnarráð og stovnar hjá landinum, tá ið bygningar og anlegg (hereftir bygningar) verða nýbygd, umbygd ella umvæld.

3.2. Landsstýrisfólkið kann í hvørjum einstøkum føri gera av, at rundskrivið við neyðugum tillagingum heilt ella partvíst skal galda stovnar, feløg, grunnar o.o., sum eru fevnd § 2, stk. 2 og 3 í løgtingslóg nr. 33 frá 23. mars 1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m.

**4. Góðska og heildarbúskapur (yvirskipað mál)**
4.1. Byggiharrin skal tryggja góðskuna á byggiverkætlanini frá hugskoti til, at bygningurin verður tikin í nýtslu. Verkætlanin skal verða skipað hóskandi og skal lúka krøv, sum verða sett til endamál, staðseting, stødd, funktiónir og snið. Útgangsstøðið fyri verkætlanini er tørvurin og ynskini hjá brúkarunum og ánaranum, og verða tey orðað sum góðskukrøv til

byggingina, umframt innbúgv, útgerð, list, uttanumøki o.a. Krøvini til góðsku fevna m.a. um byggitekniska góðsku, livitíð, virkisføri, byggilist, burðardygd og orku.

4.2. Tá ið ein byggiverkætlan verður fyrireikað, skal dentur verða lagdur á heildarbúskapin. Samanspælið millum byggi- og rakstrarkostnaðin skal havast í huga longu frá hugskotinum av. Metast skal um samlaða kostnaðin yvir ár, og eitt hóskandi lutfall millum byggi- og rakstrarkostnað skal ásetast út frá valinum av góðsku fyri byggingina.

**5. Samstarvsháttur**

5.1. Landsstýrið er ánari av byggiverkætlanini og handar ræðisrættin til verkætlanina til Landsverk. Landsverk er tá byggiharri. Greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti skal verða avtalað millum ánaran og byggiharran í einari samstarvsavtalu. At útinna verkætlanina hevur ánarin undir sær stýrisbólk, byggiharra og bygginevnd.

5.1.1. Stýrisbólkur

Stýrisbólkurin hevur yvirskipaða ábyrgd av byggiverkætlanini og hevur heimild til at taka avgerðir fyri byggiharran og bygginevndina og hevur somuleiðis heimild til at ógilda avgerðir hjá byggiharranum og bygginevndini. Stýrisbólkurin viðger og góðkennir raðfestingar av játtan, framdrátti, fíggjar- og tíðareftirliti, ráðgevara- og arbeiðstøkutrygging og viðurskifti av serligum týdningi fyri verkætlanina.

Ánarin og byggiharrin velja leiðsluumboð sína vegna í stýrisbólkin. Umboðið fyri ánaran kann ikki vera umboð frá stovni e.ø., sum skulu brúka bygningin. Er talan um minni og ikki samansetta byggiverkætlan, kunnu ánarin og byggiharrin í staðin fyri stýrisbólk velja at lata teimum, sum hava ábyrgd av málinum/verkætlanini, heimild at taka avgerðir. Er bygginevnd ikki sett, ella ráðgevar ikki valdir, kunnu umboð fyri stovnin, brúkararnar o.o. verða vald í stýrisbólkin, tó uttan avgerðarrætt.

5.1.2. Byggiharri

Byggiharrin stýrir byggiverkætlanini og hevur ábyrgd av, at hon verður útint. Verkætlanin byrjar, tá ið avgerð er tikin um, at verkætlanin skal útinnast, og heimild er fingin til at fyrireika hana. Uppgávan endar, tá ið bygningurin er avhendaður, og 5 ára sýn hevur verið. Byggiharrin skal síggja til, at avgerðir verða tiknar rættstundis um grundleggjandi viðurskifti, eitt nú um útbjóðing, bygnað, kostnað, tíðarfreistir, váðar, góðsku og byggilist. Byggiharrin hevur skyldu til at kunna ánaran um týðandi viðurskifti í verkætlanini.

5.1.3. Bygginevnd

Bygginevndin hevur ábyrgd av at orða krøv til byggiverkætlanina, at útvega upplýsingar frá brúkarunum um fakliga serkøn øki, at gera tilmæli og at kunna um verandi støðu og týðandi viðurskifti. Bygginevndin vísir til byggiharran og fylgir við, at verkætlanin verður útint í samsvari við ásettu karmarnar fyri verkætlanina. Byggiharrin hevur ábyrgd av, at bygginevndin hevur regluligar fundir.

Ánarin og byggiharrin seta bygginevndina og lata henni ein arbeiðssetning. Er talan um minni og ikki samansetta byggiverkætlan, kunnu ánarin og byggiharrin í staðin fyri bygginevnd velja umboð fyri stovnin, brúkararnar o.o. til at vera ráðgevar.

**6. Verkætlanargongd og ábyrgd**
6.1. Gongdin í og ábyrgdin av byggiverkætlanini eru lýstar í skjali 1. Verkætlanin skal verða skipað í fleiri stigum fyri at tryggja, at hon er væl fyrireikað, áðrenn farið verður í holt við at byggja, og soleiðis at hon samsvarar við krøvini til bygningin.

6.2. Byggiverkætlanin skal fylgja øllum stigunum í verkætlanargongdini. Er talan um minni og ikki samansetta verkætlan, kunnu stigini í projekteringini tillagast eftir tørvi. Gongdin í verkætlanini fevnir í minsta lagi um fyrireiking, projektering, bygging og at enda nýtslu og viðlíkahald. Umframt koma veitingar innan innbúgv, útgerð, list, uttanumøki v.m.

6.3. Tá ið farið verður undir at fyrireika verkætlanina, skal ánarin lýsa tørvin so mikið væl, at bygginevndin kann áseta greið krøv til at gera eina byggiskrá.

6.4. Projekteringin byrjar við einum skipanaruppskoti, sum er grundað á eina góðkenda byggiskrá og møguligar forkanningar. Uppskotið verður ført víðari til eitt projektuppskot. Avgerð skal tá vera tikin um øll viðurskifti, sum eru týðandi fyri verkætlanina. Tá ið forprojektið er liðugt og góðkent, er projektið fastlæst. Bygginevndin kann tá sum høvuðsregla ikki ávirka uppskotið longur. Projekteringin endar við einum høvuðsprojekti, sum er grundarlag undir endaligum loyvum, útboði, sáttmálum og útinnan.

6.5. Byggiharrin skipar fyri útboði av verkætlanini, tá ið høvuðsprojektið er liðugt. Fyri heildararbeiðstøkur og partaløg skipar byggiharrin fyri útboði, tá ið ein byggiskrá er góðkend, og møguliga ein ávegis projektering er gjørd.

6.6. Byggiharrin granskar úrslitið á hvørjum verkætlanarstigi í projekteringini. Granskingin skal verða gjørd av persóni, sum ikki arbeiðir við projekteringini, og fevnir um fíggjarlig og byggitøknilig viðurskifti. Í størri og samansettum verkætlanum eigur granskingin at verða skipað við uttanhýsis ráðgeva. Úrslitið fyri hvørt verkætlanarstig skal verða góðkent av ánaranum, áðrenn farið verður víðari.

6.7. Áðrenn byggingin fer í gongd, skulu arbeiðstakarar, eftirlit og byggileiðsla ganga ígjøgnum projektið, tíðarætlanir, tilfarsval, markamót og samskiftismannagongdir og velja teir persónar, sum skulu hava ábyrgd í verkætlanini undir byggingini. Skipað skal verða fyri regluligum fundum undir byggingini, har støðan í verkætlanini verður gjøgnumgingin í mun til tíð, kostnað, fígging, framdrátt, váðar og trygd.

6.8. Verða týðandi broytingar gjørdar í byggiverkætlanini, skal ánarin góðkenna tær. Hava broytingarnar, t.d. funktiónir, snið og stødd, stóran týdning fyri tørvin hjá brúkarunum, skal bygginevndin hava høvi at viðgera broytingarnar, gera niðurstøðu og koma við tilmæli.

6.9. Avhending fer fram, tá byggingin er liðug. Eru týðandi manglar, verður avhendingin útsett. Eru ikki týðandi manglar, hevur ánarin uttan óneyðugt drál skyldu at taka ímóti bygninginum og taka hann í brúk. Byggiharrin hevur ábyrgd av at hava 1 og 5 ára sýn.

6.10. Tá ið byggingin er liðug, er umráðandi, at bygningurin verður viðlíkahildin frá fyrsta degi. Tá ið bygningurin er avhendaður, rindar ánarin fyri dagliga viðlíkahaldinum. Landsverk ásetir reglur um viðlíkahaldsbýtið millum Landsverk og stovnar o.o. Reglurnar lýsa uppgávu- og ábyrgdarbýtið í sambandi við rakstur, dagligt viðlíkahald og bygningsviðlíkahald hjá landinum. Í serligum førum verður gjørd seravtala um býtið.

**7. Játtan og fíggjarstýring**
7.1. Ánarin hevur ábyrgd av, at neyðug játtan og undirtøka er til at útinna byggiverkætlanina, undir hesum at leggja upprit um verkætlanina fyri landsstýrisfund o.a. Í skjali 1 er ásett, nær játtan skal verða tøk til viðkomandi verkætlanarstig. Er talan um størri og samansettar verkætlanir, kann játtanin verða skipað í fleiri stigum.

7.2. Grundað á eina fakliga meting og í samráði við byggiharran ger ánarin tilmæli um eina játtanarætlan fyri verkætlanina yvir verkætlanartíðarskeiðið. Allar útreiðslur av verkætlanini skulu takast við í tilmælið, undir hesum til óvissur, sum altíð eru tengdar at einari verkætlan. Ánarin hevur skyldu at kunna og ráðføra seg við Fíggjarnevndina um metingar av kostnaði, tíð o.ø., m.a. tá ið játtan skal útvegast, ella at fortreytirnar í verkætlanini broytast.

7.3. Fyrireikingin av verkætlanini, undir hesum projekteringin, verður játtað fyri seg. Viðmerkingarnar til játtanina til at fyrireika verkætlanina skulu vera nóg neyvar til, at mett kann verða um verkætlanina so tíðliga sum møguligt, t.d. um endamál, staðseting, støðd, funktiónir og snið. Verður roknað við, at projekteringin av verkætlanini fer at kosta meira enn upphæddin í § 4 í kunngerð nr. 83 frá 7. juni 2011 um løgujáttan, skal uppskot til verklagslóg gerast um projekteringina.

7.4. Tá ið verkætlanin er liðugt fyrireikað, arbeiðstøkuútboð hevur verið, og kostnaðurin er kendur, tekur ánarin endaliga støðu til, um verkætlanin skal halda fram. Ánarin ger uppskot til verklagslóg, sum verður lagt fyri Løgtingið. Verklagslógin fevnir um verkætlanina frá tí, at byggingin byrjar. Í viðmerkingunum til uppskotið til verklagslóg skal greiðast frá, hvussu nógv fyrireikingin av verkætlanini fram til útboðið hevur kostað. Fyri heildararbeiðstøkur og partaløg verður uppskot til verklagslóg gjørt, tá ið ein byggiskrá er góðkend, møguliga ein ávegis projektering er gjørd, verkætlanin hevur verið í útboði, og kostnaðurin er kendur.

7.5. Tá ið verklagslógin er samtykt, hevur byggiharrin fíggjarstýringina av byggiverkætlanini um hendi og skal tryggja, at játtanin verður umsitin skynsamt. Byggiharrin skal tryggja, at ræðisroknskapurin fyri verkætlanina støðugt er rættur, undir hesum um nýtsluna, gjørd og avtalað arbeiði, umframt ætlaðar og mettar upphæddir til arbeiði, sum avtala ikki er gjørd um. Byggiharrin skal tryggja eina regluliga kunning til ánaran, stýrisbólkin og bygginevndina um fíggjarviðurskiftini og gongdina annars í verkætlanini.

Í sambandi við góðkenningina av mánaðarroknskapinum í Búskaparskipan landsins skal byggiharrin tryggja, at samsvar er við ræðisroknskapin. Byggiharrin hevur skyldu at tryggja, at nøktandi tíðaravmarking verður gjørd fyri verkætlanina við árslok, soleiðis at nýtslan í árinum svarar til arbeiðið, sum er gjørt í verkætlanini.

7.6. Verða týðandi broytingar gjørdar í byggiverkætlanini, eftir at byggingin er byrjað, leggur ánarin broyting í verklagslógini fyri Løgtingið. Ánarin ger í samráði við byggiharran tilmæli um broytta játtanarætlan fyri verkætlanina. Kunnu broytingarnar rúmast innan verandi játtanarætlan, kann ánarin ráðføra seg við Fíggjarnevndina.

7.7. Ánarin hevur ábyrgd av at fáa til vega játtan til at viðlíkahalda bygningin, eftir at hann er avhendaður. Viðlíkahaldið av bygninginum skal verða umrøtt sum partur av uppskotinum til verklagslóg.

**8. Frávik frá rundskrivinum**
8.1. Fíggjarmálaráðið kann fyri eina byggiverkætlan ella ávís viðurskifti loyva, at undantak ella frávik verða gjørd frá rundskrivinum. Tað kann t.d. vera fyri at avmarka váðan og kostnaðin, ella at verkætlanin kann verða løgd til rættis á ein betri hóskandi hátt.

**9. Gildiskoma**
9.1. Rundskrivið kemur í gildi 1. juli 2024.

Fíggjarmálaráðið, 24. apríl 2024

Ruth Vang
*landsstýriskvinna*

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Skjal 1**

| Verkætlanargongd | Játtan/góðkenning |
|---|---|

Byggiharrin hevur ábyrgd
Bygginevndin er ráðgevi

**Hugskot**
*Ánarin samskiftir við byggiharran um ynski at nøkta ein tørv og orðar eina virkislýsing*

**Játtan til byggiskrá**
*Játtan og undirtøka fyri verkætlanini, herundir upprit; viðmerkingarnar til játtanina skulu vera nóg neyvar til, at metast kann um verkætlanina, t.d. endamál, staðseting, stødd, funktiónir og snið*

Stjórnarráðið ger upprit til landsstýrið og mælir til játtan, sum Fíggjarmálaráð leggur fyri Løgtingið

**1. Byggiskrá**
*Lýsing av krøvum út frá virkislýsing; leyslig meting av tíð og kostnaði; grundarlag undir samstarvi um ráðgeving*

Byggiharrin hevur ábyrgd
Bygginevndin hevur ávirkan

**Játtan til projekt**
*Játtanin kann vera í stigum alt eftir stødd og verkætlan; verður roknað við, at projekteringin fer at kosta meira enn upphæddin í í løgujáttanarkunngerðini, skal uppskot til verklagslóg gerast*

**2. Skipanaruppskot**
*Fyrsta tekniuppskotið, sum lýsir byggilistarligt hugskot, virkisøki, yvirskipað tilfarsval, meginreglur fyri konstruktiónir og innleggingar; fyrsta metingin av tíð og kostnaði*

**3. Projektuppskot**
*Víðarifført tekniuppskot; avgerð um loysn av byggilist, virkisføri, tilfarsvali og tekniskar loysnir; neyvari meting av tíð og kostnaði*

Byggiharrin hevur ábyrgd
Bygginevndin hevur eftirlit

**4. Forprojekt**
*Myndugleikaprojekt; projektið verður læst fast og latið myndugleikunum at góðkenna*

**5. Høvuðsprojekt**
*Grundarlag undir endaligu útinnanini av bygninginum og lýsir byggingina í staklutir; grundarlag undir arbeiðstøkuútboði; endalig meting av tíð og kostnaði*

**6. Arbeiðstøkuútboð**
*Útboð til arbeiðstakarar; lisitatión og tilmæli um vinnandi fyritøku; samráðing og tillaging*

Stjórnarráðið ger uppskot til verklagslóg og leggur fyri Løgtingið, tá ið Fíggjarmálaráðið hevur viðmerkt; stjórnarráðið mælir til játtan

**Verklagslóg og játtan**
*Tá ið lógin er samtykt, er byggiverkætlanin góðkend, og byggingin kann byrja; lógin ásetir eina samlaða upphædd, áramál o.a.; viðlíkahaldið av bygninginum skal verða umrøtt sum partur av uppskotinum til verklagslóg*

**Verkætlanargongd** | **Játtan/góðkenning**

Byggiharrin hevur ábyrgd
Bygginevndin hevur eftirlit

**7. Bygging**
*Byrjanarfundur við arbeiðstakara; gjøgnumgongd av projekti, tíðarætlanum, tilfarsvali, markamótum og samskiftismannagongdum og velja ábyrgdarpersónar; regluligir byggifundir, HTU-fundir, gjøgnumgongd av virkisætlan, tíð og kostnaði*

**8. Projektuppfylging**
*Tillaging av projektinum; ánarin skal góðkenna størri broytingar; eru munandi broytingar í verkætlanini, t.d. funktiónir, snið og stødd, sum hava stóran týdning fyri tørvin hjá brúkarunum, skal bygginevndin hava høvi at viðgera broytingarnar, gera niðurstøðu og koma við tilmæli*

**Broytt verklagslóg og játtan**
*Broytingar í verkætlanini hava við sær broytingar í verklagslógini og játtanini; kunnu broytingarnar rúmast innan fíggjarkarmin, kann ánarin ráðføra seg við Fíggjarnevndini*

Stjórnarráðið ger uppskot til broyting í verklagslóg og leggur fyri Løgtingið, tá ið Fíggjarmálaráðið hevur viðmerkt; stjórnarráðið mælir til játtan

**9. Avhending**
*Arbeiðstakarin boðar frá, tá ið arbeiðið er liðugt; gjøgnumgongd av manglum; eru eingir týðandi manglar, verður arbeiðið handað ánaranum*

**Bygningurin góðkendur og tikin í brúk**
*Eru eingir týðandi manglar, hevur ánarin skyldu at góðkenna bygningin og taka hann í brúk*

Landsverk góðkennir bygningin eftir gjøgnumgongd við brúkara

**10. 1-ára sýn**
*Bygningurin verður sýnaður fyri møguligar feilir, sum ikki vóru sjónligir við avhending*

Viðlíkahald

**Játtan til viðlíkahald**
*Ánarin hevur ábyrgd av at fáa til vega játtan til at viðlíkahalda bygningin, eftir at hann er avhendaður*

Landsverk mælir til upphædd, sum Fíggjarmálaráðið tekur við í uppskot til játtan

**11. Viðlíkahald**
*Bygningurin kemur undir viðlíkahaldið hjá Landsverki, sum árliga metir um kostnaðin*

**12. 5-ára sýn**
*Bygningurin verður sýnaður fyri møguligar feilir, sum ikki vóru sjónligir við avhending og 1-ára sýn*